Hevur tú hug at eiga í eini alistøð -her fært tú møguleikan!



A/S SEJERØ HAVBRUG bjóðar áhugaðum at tekna 2,7 mill. kr. í partapeningi.

Ver við at mynda gongdina í føroyska vinnulívinum við at seta pening í eitt spennandi tiltak, sum nú verður sett á stovn uttanlands!

Hvat er A/S Sejerø Havbrug?

A/S Sejerø Havbrug er dóttur-felag hjá P/F Óla Arge í Havn.



Bridgestone-ringarnir hava á teimum veðurringastu og ókyrrastu plássum í heiminum prógvað, at teir eru framúr væl egnaðir til fiskaaling.

Endamálið hjá felagnum er at ala síl, og hevur felagið fingið alilóyvi við Sejerø, sum liggur í ein útsynning úr Sjællands Odde. Loyvið fevnir um aling í 4 stórum Brigdestone-ringum, men í fyrsta unfari verða einans 2 ringar lagdir út.

Hví uttanlands?


Tað er ov tvørligt at fáa loyvi til stórframleiðslu av alifiski í Føroyum. Her verða alilóyvini latin eftir støddini á alistøðunum, meðan støddin eitt nú í Danmark verður mett eftir sum staðirnar dálka. Í Føroyum gongst illa at fáa nóg mikið av smolti og yngli at seta út - og als ikki til so stóra framleiðslu. Hetta vandamál er ikki til í Danmark. Av tí at alistøðin er í einum EF-landi, fæst stórur studningur samstundis sum framleiðslan fær ein tollfyrimun upp á u. l. 10% í mun til alifisk úr øðrum londum, sum eru uttan fyri EF.



Torkild A. Nielsen, nevndarformaður í A/S Sejerø Havbrug og deildarstjóri í Partner Finans og Investering í Århus, hevur royndir sum figgjarstjóri í einum dótturfelag hjá einari amerikanskari handilsfyritøku, hevur arbeitt 16 ár í Handilsbankanum og verið á námstílhaldi í Chase Manhattan Bank.

»Udstyret der anvendes til projektet, er testet under de hårdeste vejrforhold rundt i verden. Det store forarbejde og den ekspertise der er samlet i selskabets bestyrelse og direktion, samt de samarbejdsaftaler, der er lavet med bl.a. Dansk Akvakultur Institut, sikrer projektet bedst muligt mod eventuelle indkøringsvanskeligheder. Prognoserne har vist, at den positive udvikling, som markedet har udvist de senere år, vil fortsætte, og det vil betyde pæne eksportindtægter.«

A/S Sejerø Havbrug hevur nýtt fleiri hundrað túsund krónur til kanningar av viðurskiftunum við Sejerø. Dansk Akvakultur Institut (DAI) og Dansk Hydraulisk Institut (DHI) hava m. a. gjørt kanningar av veður-, hita-, streym- og alduviðurskiftunum, soleiðis at trygd er fyri, at alistøðin verður løgd har, sum fiskinum verða tryggjaðar bestu umstøður at trívast og vaksa. Harumframt skal peningur setast í framleiðslubygningar og ein serútgjørdan fóðurbát av nýggjasta slag við fóðurkanón, krana, kraftblokki og bógskrúvu.



Sejerø við plássinum, har ætlanin er at leggja teir báðar Bridgestone-ringarnar. Eisini sæst, hvar framleiðslubygningarnir skulu standa á oynni.



fish farming INTERNATIONAL

TURN TO PAGE 20 FOR MORE DETAILS

DECEMBER 1985 VOLUME 12 No. 12

MONTHLY £1.25

DANISH FARM GOAL IS 50,000 TONS

Jens Ole Olesen of DAI Forecasts revised

Japanese expect a record

Production double by

THE RIGHT AT THE

Samstarvssáttmáli er gjørdur við DAI, sum hevur djúptøknan kunnleika til aling í Danmark. Sambært hesum sáttmála hevur DAI ábyrgdina av dagliga rakstrinum av alistøðini.

Framleiðslan er í fyrstu syftu ætlað at fevna um 2 Bridgestone-ringar. Í apríl verða síl, ið viga eini 6-800 g, sett út, og longu í oktober-desember í ár verða tey tikin, og fer miðalvektin tá ætlandi at verða um 2,5 kg. Samlaða framleiðslan í 1986 fer at liggja um 250-300 tons. Um veturin verða ringarnir upptiknir, av tí at vandi er fyri nógvum ísi.

Útroknингarnar hjá DAI frá 1984 yvir framleiðslu av sjóaldum síli í Danmark. Longu nú hevur DAI broytt metingarnar fyri 1990 til millum 20- og 30.000 tons, m. a. av tiltakinum á Sejerø.

Ein trygg íløga

A/S Sejerø Havbrug verður soleiðis skipað, at tú ikki heftir fyri meira peningi, enn tú setur í - í mun til um tú í staðin setir peningin í eitt nú skipspartar. Haraftrat ert tú sum B-partabrævaeigari betri staddur enn vanligir partabrævaeigarar. Í grein 21 í viðtøkunum hjá felagnum stendur:

»Om anvendelse af eventuelt overskud, træffer generalforsamlingen beslutning efter bestyrelsens indstilling, dog således, at A-aktierne kun kan tillægges udbytte, såfremt B-aktierne har modtaget mindst 20% p.a. i udbytte for såvel det indeværende som det forudgående regnskabsår. Ved selskabets opløsning skal, såvidt formuen tilstrækker, B-aktierne have ret til forlods dækning for deres pålydende med tillæg af manglende kumulativt udbytte for det tidligere regnskabsår.«

Sundurbýti í A- og B-partabrøv er gjørt, av tí at A/S Sejerø Havbrug vil hava serkøna leiðslu,ið er før fyri at taka avgerðir og seta tiltøk í verk, so títt og knapt tørvur er á. Afturfyri hetta gevur felagið B-partabrævaeigarunum fyrsta rætt til vinningin!

Tey, sum seta seg fyri ein part í A/S Sejerø Havbrug, fara seinni at fáa fyrstarætt til at seta seg fyri partapeningi í eini líknandi alistøð við Åbenrå og seinni eisini í ætlaðar ali- og smoltstøðir í Írlandi og Grikkalandi.

Nevndin

Nevndin í felagnum er sett saman av fólkum, sum umboða virksemi og áhugamál felagsins, og í henni sita:

Ein danskur løgfrøðingur
Ein danskur bankamaður og figgjarfrøðingur (formaður)
Ein fiskalívfrøðingur
Eitt umboð fyri A-partabrøvini
Eitt umboð fyri B-partabrøvini
Eitt umboð fyri fólkið, ið býr á Sejerø

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til P/F Óla Arge, tlf. 16161.

Minnist til at senda inn innan 20. februar 1986!

Eg seti meg fyri eftirfylgjandi tali av B-partabrøvum, sum verða roknað til kurs 110:

____ partabrøv á 1.000 kr. ____ partabrøv á 5.000 kr. ____ partabrøv á 10.000 kr.

Navn

Bústaður

Byur/bygd

At senda til P/F Óla Arge, Postsmoga 92, 3800 Tórshavn

TEAM 85